Bjørt Samuelsen
Johan Dahl
Beinir Johannesen
Henrik Old
Jákup Mikkelsen
Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

Løgtingsmáli nr. 51/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin) (Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækking av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 4, verður § 7 orðað soleiðis:

"**§ 7.** Gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipanina eru:
1) allir persónar, sum móttaka inntøku sbrt. § 2, nr. 1, og sum hava fylt 16 ár, men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og
2) øll, sum rinda inntøkur sbrt. § 2, nr. 1.

Stk. 2. Persónar, sum eftir løgtingslóg um almannapensjónir fáa hægstu fyritíðarpensjón, verða undantiknir frá gjaldskyldu, sbr. § 8 a.

Stk. 3. Persónar, sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir frá gjaldskyldu."

2. § 1, nr. 6 verður strikað.
Nr. 7-16 verða eftir hetta nr. 6-15.

3. Í § 2, stk. 2 verður "§ 1, nr. 11 og § 1, nr. 12" broytt til: "§ 1, nr. 10 og § 1, nr. 11".

Viðmerkingar

Til nr. 1

Orsøkin til broytingina er, at sambært galdandi § 7, stk. 2 eru persónar, ið móttaka hægstu fyritíðarpensjón, undantiknir frá gjaldskyldu til Arbeiðsloysisskipanina – eisini av aðrari inntøku enn fyritíðarpensjónini. Summir fyritíðarpensjónistar arbeiða kanska eitt sindur og hava eina inntøku av hesum arbeiði.

Gerst ein fyritíðarpensjónistur arbeiðsleysur, hevur hann ikki møguleika fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul úr Arbeiðsloysisskipanini, tí at hann er ikki tøkur á arbeiðsmarknaðinum ella arbeiðsførur at átaka sær eitthvørt fulltíðarstarv, sum er treyt fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul. Tí eiga fyritíðarpensjónistar heldur ikki at rinda ALS-gjald av inntøkuni, ið teir vinna afturat fyritíðarpensjónini.
Galdandi § 7, stk. 2 eigur sostatt at verða verandi í gildi.

Til nr. 2
§ 8 a skal ikki strikast kortini.
Galdandi § 8 a snýr seg um, at undantøka frá gjaldskyldu eftir § 7, stk. 2, fyritíðarpensjónistar, verður veitt eftir umsókn til Arbeiðsloysisskipanina.

Tó at tað ikki er neyðugt við umsókn fyri at sleppa undan at rinda ALS-gjald av sjálvari fyritíðarpensjónini, er neyðugt við umsókn, fyri at fyritíðarpensjónistar kunnu sleppa undan at rinda ALS-gjald av aðrari A-inntøku enn fyritíðarpensjónini. Arbeiðsloysisskipanin hevur ikki møguleika fyri at vita, hvørja A-inntøku ein fyritíðarpensjónistur móttekur umframt fyritíðarpensjónina. Tí er neyðugt, at teir persónar, ið fáa fyritíðarpensjón, søkja um undantøku frá at rinda ALS-gjald av aðrari inntøku, ið teir fáa. Tí eigur § 8 a at verða varðveitt í lógini.

Til nr. 3
Teknisk fylgibroyting av broyting nr. 2.

Á Løgtingi, 10. desember 2020

Bjørt Samuelsen Johan Dahl

Beinir Johannesen Henrik Old

Jákup Mikkelsen Bjarni Kárason Petersen